# Tey ungu vilja heim



**LÍV OG LAGNA** Bjørn og Lükka Patursson vilja nú aftur í Koltur – og tey ungu vilja inn á meginøkið aftur. - Tá eg fekk starvið sum búnaðarstjóri, royndi eg at sannføra meg sjálvan um, at tíðin ivaleyst var komin til at fara úr Koltri og royna okkurt annað. Eg var tá farin um tey fimmti. Nú royni eg av nýggjum av sannføra meg um, at skulu vit útaftur í Koltur, so má tað vera nú – og áðrenn árini gerast ov mong, sigur Bjørn Patursson

Vilmund Jacobsen

Eftir at hava verið í stjórastarvinum á Búnaðardeplinum í Kollafirði í eitt stórt ár, hevur Bjørn Patursson nú boðað arbeiðsgevara sínum frá, at hann ynskir at verða loystur úr hesum starvi samstundis, sum hann ynskir at taka við festinum aftur í Koltri.

Bjørn og Lükka Patursson tóku í sínari tíð við festinum í Koltri hin 1. januar í 1994 og fluttu úr aftur Koltri hin 1. februar í 2009.

## Dreymastarv

Tá Bjørn Patursson fyri góðum ári síðan fekk sítt dreymastarv sum tað er hjá landbúnaðarmanni at gerast stjóri á Búnaðardeplinum, tók dóttirin, Malan og maður hennara, Petur á Dul Patursson, við festinum í Koltri.

- Jú, eg fekk mítt dreymastarv, og eg var ógvuliga errin av at fáa hetta starvið, sum eg slett ikki hevði roknað við at fáa. At gerast búnaðarstjóri er eftir mínum tykki tað ultimativa innan landbúnaðin. Eg havi fingist við landbúnað síðan 1984 og havi eitt nú verið formaður í Bóndafelagnum. Men hetta er avgjørt tað hægsta, tú røkkur innan føroysk landbúnaðarviðurskifti.

**» jú, eg fekk mítt dreymastarv, og eg var ógvuliga errin av at fáa hetta starvið, sum eg slett ikki hevði roknað við at fáa**

**BJØRN PATURSSON**

Bjørn Patursson sigur, at hann trívist sera væl sum búnaðarstjóri og vísir á, at stovnurin er vælvirkandi og hevur nógv og góð starvsfólk at føra verkið víðari. Ymiskt er loyst úr lagdi, og skjøtil er settur á onnur mál føroyskum landbúnaði at gagni.

- Eg stúri slett ikki fyri, at stovnurin í Kollafirði ikki er í góðum hondum. Eg stúri meiri fyri lagnuni, sum Koltur kann fáa, nú dóttir mín og maður hennara hava tikið avgerð um at fara haðani